Havbúnaðarfelagið
FAROESE FISH FARMERS

# AÐALFUNDUR HJÁ HAVBÚNAÐARFELAGNUM
# 17. MAI 2013

# ÁRSFRÁGREIÐING 2012

Faroese Fish Farmers · Smærugøta 9A · P.O. Box 1038 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel +298 30 99 00 · www.industry.fo

## Frágreiðing frá nevndini

Føroyska framleiðslan av laksi var í fjør 62.783 tons í kruvdari vekt, meðan eingi síl vórðu tikin. Framleiðslan øktist sostatt við umleið 13.000 tonsum, og søluvirðið í 2012 øktist eisini úr 1,62 mia. kr. í 2011 upp í 1,81 mia. kr í 2012. Hetta er ein vøkstur uppá uppá sløk 12 prosent. Vøkstur hevur sostatt verið í bæði nøgd og søluvirði.

Karmarnir kring alivinnuna eru sum heild góðir, og vinnan hevur eins og undanfarin ár havt góð úrslit, tá hugt verður at vøkstri, felli, sjúkustøðu, framleiðslukostnaði og prísi. Framleiðslukostnaðurin hevur tó verið hækkandi seinastu árini, og tað er ein avbjóðing hjá feløgunum. Eingir tilburðir við nýggjum fiskasjúkum hava verið seinasta árið. Hetta saman við rímiliga góðum marknaðarprísi hevur havt við sær, at alivinnan hevði góð fíggjarlig úrslit í 2012.

Alarar eru eins og undanfarin ár samdir um, at lívfrøðiliga váðastýringin áhaldandi skal raðfestast høgt. Feløgini eru tí farin at samstarva meira fyri at t.d. stríðið ímóti lús skal geva betur úrslit. Á vári 2012 avráddu feløgini at gevast við at nýta avlúsingarevni, ið kunnu elva til mótstøðuføri, og heldur nýta hydrogenperoxid í eitt tíðarskeið, áðrenn hini evnini kunnu nýtast aftur seinni.

Tað er framvegis neyðugt at hava neyvt eftirlit við laksalúsini, og tey fýra alifeløgini hava á vári 2013 gjørt eina sjálvbodna skrivliga avtalu um felags tiltøk ímóti lús. Avvarðandi myndugleikar eru kunnaðir um hesa avtalu. Avtalan inniber í stuttum felags avlúsing og at býta vitan og úrslit sínamillum. Feløgini ásanna við hesum, at neyðugt er við munadyggum tiltøkum fyri at tálma lúsini, og at tað framhaldandi er neyðugt at arbeiða í felag við hesum máli.

Seinastu árini er útboðið av laksi á heimsmarknaðinum økt munandi, av tí at framleiðslan í Kili og Noregi er økt. Vøksturin í framleiðsluni fer tó at steðga upp í 2013 sambært greinarum, og framleiðslan verður á leið tann sama í ár sum í fjør. Heimsframleiðslan av laksi verður góðar 2 mió. tons í 2013. Marknaðarútlitini fyri 2013 og 2014 eru tískil góð, og prísurin á laksi verður væntandi lutfalsliga góður. Laksaprísurin hevur tó søguliga sveiggjað nógv, og tí koma tíðarskeið, tá torført er at vinna pening á marknaðinum.

Í 2012 vórðu umleið 15 mió. smolt sett út. Hetta er meira enn í 2011, tá ið 12,1 mió. smolt vórðu sett út. Alivinnan væntar ikki, at framleiðslan av alifiski kann vaksa munandi við verandi tøkni, men betri gagnnýtsla av verandi aliøkjum kann økja framleiðsluna nakað. Tøkan av laksi verður væntandi á leið tann sama í 2013, sum hon var í 2012.

Týdningarmestu málini, sum nevndin í Havbúnaðarfelagnum hevur arbeitt við undanfarna ár eru m.a. arbeiðið at víðka aliøkini, áhaldandi arbeiðið at tálma laksalúsini, málið víkjandi tilfeingisgjaldi, uppskot um reglugerð um útskifting og reinsing av barlastarvatni, aling á opnum

havi, nýggjur alipolitikkur frá Vinnumálaráðnum, broytingar í alilógini, heilsuváttanir til kinesiska marknaðin eins og árliga aliráðstevnan varð hildin.

Í 2012 varð komið á mál við arbeiðnum at víðka aliøkini, sum er eitt mál, ið myndugleikarnir hava arbeitt við eina tíð. Hetta er gjørt við broyting í fylgiskjali 1 í kunngerð um sjúkufyribyrgjandi rakstur. Hetta gevur feløgunum betri møguleika at leggja alingina til rættis og møguleika at flyta alingina longur út á økir, ið hava betri útskifting av sjógvi.

Seinastu tvey árini hevur ali- og fiskivinnan rindað ein serligan tilfeingisskatt, sum er 2,5% av vinningi omanfyri 1 mió. kr. Hesin skattur er aftur galdandi fyri 2013, men óvist er, hvussu tað verður í 2014. Útmeldingarnar úr politisku skipanini eru, at ein nýggj skipan við tilfeingisgjaldi skal gerast, og hon skal geva landskassanum 145 mió. kr. um árið frá 2014 til 2018. Hetta stendur at lesa í uppskotinum til samtyktar um fíggjarkarmar. Alivinnan skal síðani rinda 40 mió. kr. av hesum. Landsstýrið hevur áður meldað út, at ein nýggj skipan við tilfeingisgjaldi skal setast í verk, og tað elvir til eina ávísa óvissu í vinnuni. Sambært fíggjarkørmunum fyri 2014 skal uppskot um nýtt tilfeingisgjald leggjast fyri løgtingið á heysti 2013.

Havbúnaðarfelagið hevur framvegis ta støðu, at felagið er ímóti at rinda tilfeingisgjald/skatt, samstundis sum fiskivinnan fær stuðul til t.d. skattalætta til sjófólk og annan stuðul. Alivinnan rindar hinvegin brúkaragjøld fyri fleiri kravd eftirlit, ið almennir stovnar fremja, meðan fiskivinnan ikki rindar tær útreiðslur, ið tað almenna m.a. hevur av eftirliti við fiskivinnuni. Her krevur Havbúnaðarfelagið, at ali- og fiskivinnan fáa somu sømdir at virka undir.

Samanumtikið var 2012 eitt søguligt ár hjá føroyskari alivinnu, tí ongantíð áður hevur framleiðslan av alifiski verið so stór. Alivinnan stendur í dag fyri umleið einum triðingi av útflutninginum av vørum úr Føroyum. Tað er at fegnast um, at alivinnan hevur staðið seg væl seinastu árini, samstundis sum fíggjarkreppa hevur herjað bæði her heima og úti í heimi.

# Innihaldsyvirlit

1. ENDAMÁL HAVBÚNAÐARFELAGSINS ........ 6

2. ALMENT UM GONGDINA INNAN ALIVINNUNA ........ 7

2.1 FRAMLEIÐSLA ........ 8
2.2 ÚTSETING AV SMOLTI ........ 9
2.3 ÚTFLUTNINGUR ........ 10
2.4 PRÍSIR ........ 12
2.5 BÝTIÐ AV ÚTFLUTNINGI ........ 13
2.6 BÝTIÐ SEINASTU ÁRINI ........ 14

3. MÁL FELAGIÐ HEVUR ARBEITT VIÐ Í ÁRINUM ........ 17

3.1 GJØLD FYRI TÆNASTUR OG EFTIRLIT ........ 17
3.1 VÍÐKAN AV ALIØKJUM ........ 18
3.3 NÝGGJUR ALIPOLITIKKUR ........ 18
3.4 HAVUMHVØRVISLÓGIN ........ 19
3.5 SERLIGUR SKATTUR Á ALIVINNU ........ 19
3.6 BROYTINGAR Í ALILÓGINI ........ 20
3.7 ALIRÁÐSTEVNAN ........ 21
3.8 LÚSASTØÐAN OG RAKSTRARKUNNGERÐ ........ 21
3.9 GRANSKINGARVERKÆTLANIR ........ 21
3.10 SALMON FROM THE FAROE ISLANDS ........ 22
3.11 ISFA OG FEAP ........ 22

4. LÓGIR OG KUNNGERÐIR ........ 23

4.1 LÓG UM TILFEINGIS/LOYVISSKATT ........ 23
4.2 RAKSTRARKUNNGERÐIN ........ 23
4.3 BROYTINGAR Í ALILÓGINI ........ 23
4.4 BROYTING Í GJØLDUM ........ 23
4.5 HOYRING UM YVIRVØKU AV YMSUM SJÚKUM ........ 24

## 1. Endamál Havbúnaðarfelagsins

Havbúnaðarfelagið er vinnugreinafelag hjá alivinnuni - bæði á sjógvi og á landi. Endamál felagsins er at fremja tey mál, ið eru av felags áhuga fyri limirnar. Uppgávan hjá felagnum er at menna vinnuna í samstarvi við einstøku limirnar, myndugleikar og stovnar, ið varða av alivinnuni.

Felagið heldur til í Vinnuhúsinum og hevur felags umsiting við Føroya Arbeiðsgevarafelag og onnur vinnufeløg.

Í nevndini í Havbúnaðarfelagnum sita:
Atli Gregersen, Luna
Hans Jákup Mikkelsen, Marine Harvest
Regin Jacobsen, Bakkafrost

Eykalimur:
Odd Eliasen, Havsbrún

## 2. Alment um gongdina innan alivinnuna

Alivinnan er framvegis væl fyri, og fíggjarligu úrslitini seinastu árini hava verið góð. Framleiðslan hevur verið hækkandi seinastu árini, og laksaprísurin hevur verið á einum lutfalsliga høgum støði. Gongdin seinastu árini hevur verið, at alsamt færri feløg eru í vinnuni, og í dag eru fýra alifeløg í Føroyum. Karmarnir um alivinnuna eru sum heild góðir, hóast ávísar ábøtur kundu verið gjørdar. Tað er av alstórum týdningi, at alivinnan framhaldandi leggur dent á skynsaman rakstur við neyvari framleiðslustýring.

Tryggir og støðugir karmar umframt nærlagni tryggja, at alivinnan í dag kann sigast at vera burðardygg. Føroyska alivinnan kann vísa á nøkur av heimsins bestu úrslitum viðvíkjandi vøkstri, felli, sjúku, framleiðslukostnaði og prísi. Samanborið við aðrar alitjóðir hevur føroyska alivinnan sera góð úrslit á teimum flestu parametrunum.

Síðan 2006 er framleiðslan av alifiski økt støðugt ár um ár uttan í 2010. Men nú kemur væntandi stígur í hendan vøkstur, av tí at alingin hevur rakt eitt nattúrligt mark fyri, hvussu nógv kann alast í Føroyum við verandi tøkni. Framleiðslan í 2012 var sløk 63.000 tons í kruvdari vekt, og so nógv hevur ongantíð áður verið framleitt í Føroyum. Gamla metið var frá 2003, tá ið framleiðslan var 52.269 tons av laksi og sílum. Havast skal í huga, at hetta árið vórðu feløgini noydd at slakta stórar nøgdir av fiski í úrtíð orsakað av ILA sjúkuni. Tá framleiddi alivinnan 43.017 tons av laksi og 9.198 tons av sílum.

Meðan framleiðslan í 2005 og 2006 lá um 20.000 tons í rundari vekt, er framleiðslan økt munandi seinastu árini. Framleiðslan av laksi var 76.800 tons í rundari vekt í 2012, meðan framleiðslan árið fyri var góð 60.000 tons. Í 2010 vóru umleið 45.000 tons tikin í rundari vekt, so vøksturin í nøgd hevur verið stórur seinastu árini. Søluvirðið í 2012 var umleið 1,81 mia. kr., meðan søluvirðið í 2011 var 1,62 mia. kr. Samanumtikið hevur 2012 verið eitt gott ár við øktari framleiðslu annað árið á rað.

Í 2013 verður roknað við, at útboðið á heimsmarknaðinum bert økist við tveimum prosentum. Orsøkin er, at framleiðslan í Noregi, Skotlandi og Norðuramerika fer at minka nakað í ár, meðan framleiðslan í Kili økist við einum triðingi. Føroyska framleiðslan av laksi verður væntandi á leið tann sama sum í 2012. Støðan á heimsmarknaðinum hevur annars verið merkt av, at vøksturin í útboðnum hevur verið ógvuliga stórur seinastu árini, og prísurin er fallin av tí orsøk.

Í 2013 verður mett, at tøkan av laksi verður 62.700 tons í kruvdari vekt. Hetta er tað sama sum í 2012. Laksaprísurin kann tó væntast at vera hægri í ár enn í fjør, og tí eru útlit fyri, at útflutningsvirðið verður enn hægri í 2013 enn undanfarin ár.

Síðan 2010 er miðalprísurin á feskum føroyskum laksi minkaður hvørt ár. Sum mynd 1 vísir, var prísurin Í 2010 umleið 36 kr/kg, í 2011 var prísurin umleið 31 kr/kg og í fjør var prísurin á leið 29

kr/kg. Orsøkin til minkingina er, at útboðið er økt munandi hesi árini. Hóast prísurin hevur verið fallandi seinatu árini, hevur hann framvegis verið á góðari leið hjá framleiðarunum.




Mynd 1. Kiloprísur á feskum heilum, kruvdum laksi (FOB eksportprísur) Kelda: Kontali Analyse

Prísurin hevur tí verið lutfalsliga høgur seinastu árini, hóast hann hevur verið fallandi orsakað av øktum útboði. Torført er at meta um langtíðarútlitini, men ábendingar eru um, at prísurin verður nakað hægri í 2013 enn í 2012.

Alivinnan er von við stór sveiggj í prísinum, og prísfallið hevur verið væntandi. Søgan sigur, at prísurin sveiggjar nógv, men um føroyskir alarar framhaldandi hava ein burðardyggan rakstur og megna at fyribyrgja sjúku, kann alivinnan liva við teimum sveiggjum, ið eru ár um ár.

Við ásetingum um árgangssundurskiljing, økishvíld og sjúkufyribyrgjandi atburð, verður mett, at alivinnan hevur karmar fyri burðardyggum rakstri. Tað er sera týdningarmikið, at vinnan og myndugleikarnir framhaldandi arbeiða við at betra hesar karmar.

Seinastu árini hevur ein ávísur trupulleiki verið við lús, og fyritøkurnar í alivinnuni eru samdar um at skipa felags átøk fyri at basa hesum.

## 2.1 Framleiðsla

Tøkan í 2012 var 76.803 tons í livandi vekt, og hetta er ein munandi vøkstur samanborið við 2011. Í 2012 vórðu eingi síl tikin, tí einki hevur verið sett út seinastu árini. Framleiðslan í alivinnuni vaks nógv frá 1999 til 2003 og minkaði síðani fram til 2007 orsakað av ILA. Hetta sæst í Mynd 2. Í 2008 og

2009 var tøkan komin uppaftur á sama støði sum í 2003. Meðan nøgdin minkaði nakað í 2010, so hevur tøkan ongantíð áður verið so stór sum í 2012. Árið í fjør var tí søguligt fyri føroyska alivinnu.

Mynd 2. Tøka av alifiski 1996-2012 (rund vekt)




| | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Síl | 0,91 | 1,44 | 1,26 | 3,29 | 1,31 | 3,12 | 11,1 | 10,2 | 5,09 | 4,49 | 5,48 | 7,64 | 9,00 | 8,80 | 2,38 | 0,00 | 0,00 |
| Laks | 17,7 | 20,3 | 19,2 | 39,3 | 33,5 | 46 | 45 | 52,5 | 41 | 19 | 13,1 | 22,3 | 38,8 | 51,5 | 45,4 | 60,4 | 76,8 |

Kelda: Rúni Dam, sp/f Avrik.

Mynd 3 vísir tøkuna av alifiski í kruvdari vekt viku fyri viku, og her sæst hvussu tøkan av alifiski býtir seg yvir árið. Vanliga gongdin er, at meira verður tikið um heystið enn aðrar tíðir á árinum.

Mynd 3 Tøka av alifiski viku fyri viku í 2012.




Kelda: Havbúnaðarfelagið

## 2.2 Útseting av smolti

Mynd 4 vísir útseting av laksi og sílum frá 1995 til 2012. Myndin vísir, at útsetingin av smolti er vaksin støðugt frá 2004 til 2012 – við undantaki av 2008 og 2011. Útsetingin í 2012 var 15 mió. smolt, og tað er ein vøkstur samanborið við 2011, tá 12,1 mió. smolt vórðu sett út. Vert er at leggja til merkis, at útsetingin framvegis er munandi lægri, enn hon var árini eftir aldarskiftið.

Í 2007 vóru omanfyri tvær mió. síl sett út, í 2008 varð talið áleið 1,5 mió., í 2009 vóru minni enn 1 mió. síl sett út, men síðan 2010 eru eingi síl sett út.

Mynd 4. Útseting av smolti frá 1995 til 2012




Kelda: Rúni Dam, s/pf Avrik

## 2.3 Útflutningur

Mynd 5. Útflutningsvirðið av alifiski frá 2003 til 2012 (1000 kr.)




Kelda: Hagstova Føroya

Mynd 5 vísir, at útflutningsvirðið á alifiski er økt hvørt ár síðani 2006. Útflutningsvirðið á alifiski í 2003 var eina slaka milliard krónur. Í 2005 og 2006 varð útflutningsvirðið minkað niðurum hálva milliard krónur fyri síðani at økjast ár fyri ár til og við 2012. Í 2009 var útflutningsvirðið slakar 1,4 milliardir krónur, og hóast tøkan í 2010 varð væl lægri enn í 2009, so var útflutningsvirði eitt vet hægri orsakað av góðum prísi. Í 2012 var útflutningsvirðið hægri enn 1,8 mia. kr., og so stórt hevur

útflutningsvirðið av alifiski ongantíð verið áður. Laksur er í dag størsta einstaka útflutningsvøra hjá Føroyum og stendur fyri umleið einum triðingi av tí føroyska vøruútflutninginum.

Miðalprísurin á aldum laksi á heimsmarknaðinum var nakað lægri í 2012 enn undanfarin ár. Miðalprísurin á heimsmarknaðinum var ongantíð hægri enn 30 NOK/kg, og miðalprísurin fyri árið var 26,58 NOK/kg.[1]

Útlitini komandi tíðina verða mett at vera hampuliga góð, tí at útboðið á heimsmarknaðinum ikki økist munandi. Framleiðslan í Noregi, Skotlandi og Norðuramerika fer væntandi at minka, meðan Kili økir framleiðsluna við 31 prosentum ella umleið 110.000 tonsum. Vøksturin í framleiðsluni í Kili fer væntandi at steðga í 2014.

Føroyski útflutningurin av alifiski byggir á eina vinnu, sum hevur sera góðar karmar. Hesir karmar vórðu lagdir, meðan alivinnan var í kreppu, og hava síðani havt sera góð úrslit. Hetta hevur skapt áhuga hjá íleggjarum at gera íløgur í alivinnuna. Alarar hava í dag ein skynsaman rakstur, har umhvørvisvernd og sjúkufyribyrging eru í hásæti. Framleiðslan er bygd á eina burðardygga alivinnu við neyvari sjúkufyribyrging og váðastýring.

Í 2008 varð alivinnan stongd úti av russiska marknaðinum, men marknaðurin lat uppaftur í 2009. Russar kravdu fyrst, at útflutningurin av feskum alifiski skulu seglast í Føroyum og ikki latast uppaftur fyrr enn í Russlandi. Hetta gjørdi tað ógvuliga trupult og kostnaðarmikið at selja laks til Russlands, og útflutningurin av feskum laksi til russiska marknaðin steðgaði. Hesum kravi gingu russiskir myndugleikar frá í 2011, soleiðis at tað nú ber til at lasta feskan alifisk um í Danmark, har danskir heilsumyndugleikar segla bingjurnar. Hetta er ein av orsøkunum til, at útflutningurin til Russlands aftur er farin at økjast.

Atgongdin til russiska marknaðin er tó avmarkað, tí at nøkur kryvjivirki framvegis ikki eru góðkend til at framleiða laks til russiska marknaðin, hóast tey sambært Heilsufrøðiligu Starvsstovuni lúka heilsufrøðiligu krøvini frá russiskum myndugleikunum. Tað hevur víst seg at vera ómøguligt at fáa hesa góðkenning frá heilsufrøðiligu myndugleikunum í Russlandi. Havbúnaðarfelagið vísir á, at hetta er eitt mál, sum føroyskir myndugleikar eiga at arbeiða víðari við, hóast tað er torført at finna eina loysn.

Ein slíkur stongsul á russiska marknaðinum hevur stóra ávirkan á vinnuna, og alt eigur at gerast fyri at sleppa undan slíkum støðum. Felagið eftirlýsir framvegis einum virknari leikluti frá føroyskum myndugleikum, tá tað snýr seg um at tryggja marknaðaratgongd fyri føroysku alivinnu.

[1] Fish Pool: http://fishpool.eu/iframe.aspx?iframe=fpbackoffice/pricedetails.aspx&pageId=53

## 2.4 Prísir

Marknaðarprísurin hevur sjálvsagt stóra ávirkan á úrslitið hjá alivinnuni, og hann sveiggjar nógv. Mynd 6 vísir ársmiðalprís á feskum kruvdum laksi frá 1994 til 2011. Sum myndin vísir, eru nakrir prístindar og nakrar prísgjáir. Seinastu árini hava verið heldur serlig, av tí at framleiðslan í Kili minkaði burtur í einki, men hevur síðani tikið seg uppaftur. Prístindar hava verið í 1994, 2000, 2006, og seinastu trý árini hevur prísurin verið góður, meðan prísgjáir vóru í 1997 og 2003.

Útlitini fyri marknaðarprísinum komandi árini er nógv tengt at gongdini í heimsframleiðsluni. Metingar siga, at heimsframleiðslan ikki fer at økjast nakað serligt í ár, hóast Kili økir sína framleiðslu. Í 2014 er vøksturin í Kili væntandi steðgaður, og tí meta greinarar, at útlitini fyri høgum laksaprísi í 2013 og 2014 eru góð.

Mynd 6. Ársmiðal prísir á feskum kruvdum laksi. FOB Føroyar




Kelda: Hagstova Føroya

Meðalprísurin á feskum kruvdum laksi var í 2012 28,4 krónur fyri kilo. Hetta er munandi lægri enn í 2010, tá miðalprísurin var 37,2 krónur fyri kilo.[2]

Prísurin á feskum kruvdum laksi var í 2000 í miðal góðar 28 kr./kg og fall síðani til góðar 16 kr./kg í 2003. Prísurin er síðani hækkaður á hvørjum ári fram til 2006, tá hann var á nærum 30 kr./kg í miðal. Í 2008 lækkaði prísurin aftur til einar 24 kr./kg. Í 2009 hækkaði prísurin aftur til nærum 28 kr./kg, og í 2010 varð hann omanfyri 37 kr./kg.

[2] Uppgerðin frá Hagstovuni samsvarar ikki nágreiniliga við uppgerðina frá Kontali Analyse, men gongdin er á leið tann sama.

Mynd 7. Miðalprísur pr. kg. av frystum laksaportiónum.




Kelda: Hagstova Føroya

Mynd 7 vísir miðalprísin á frystum laksaportiónum frá 2003, tá framleiðslan veruliga tók dik á seg. Miðalprísurin í 2011 var 71,67 kr./kg., og harvið gjørdist prísurin hægri enn í 2006, tá hann var hægst.

Prísurin á laksaportiónum er meira støðugur enn prísurin á feskum laksi. Prísurin hevur ligið rímiliga støðugt omanfyri 50 kr./kg. Í 2006 var prísurin 68 kr./kg. og lækkaði síðani. Miðalprísurin í 2011 var tann hægsti nakrantíð síðan 2003, men prísurin fall munandi í 2012 til 58,58 kr/kg.

## 2.5 Býtið av útflutningi

Mynd 8 vísir býtið av útflutninginum í virði frá 2003 til 2012. Nógv tann størsti parturin er framvegis feskur laksur, sum er verdur umleið 1,3 mia.kr. í útflutningsvirði. Síðan 2006 eru laksaportiónir vorðnar ein alsamt størri partur av útflutninginum av laksi, og tær standa fyri meginpartinum av restini av útflutninginum, meðan nakað verður útflutt at heilum frystum laksi. Útflutningsvirðið á laksaportiónum hevur verið støðugt hækkandi seinastu árini, og var tað 447 mió. kr. í 2012.

Á Mynd 8 sæst eisini, hvussu útflutningsvirðið er økt munandi seinastu árini, og í fjør var aftur ein vøkstur uppá umleið 12 prosent. Í 2007 táttaði útflutningsvirðið frá alivinnuni í 600 mió. kr. og er síðani økt hvørt ár. Útflutningurin frá laksavørum var 1,82 mia. kr. í 2012.

Mynd 8. Býtið av alifiski í virði




Kelda: Hagstova Føroya

## 2.6 Býtið seinastu árini

Niðanfyri er eitt samlað yvirlit fyri útflutningsvirði, nøgd og prísir fyri ymsu vørurnar, sum alivinnan framleiðir. Legg til merkir, at fráskurðir o.a. ikki er tikið við í hesa uppgerðina. Tølini eru fyri seinastu níggju árini.

Talva 1. Útflutningsvirði fyri ymsu vørurnar frá 2004 til 2012, í 1.000 kr.

| | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 424.299 | 206.522 | 134.650 | 254.581 | 547.364 | 795.934 | 803.161 | 1.113.740,60 | 1.282.704,70 |
| Frystur laksur | 69.632 | 53.660 | 32.573 | 55.274 | 40.826 | 68.587 | 69.508 | 26.507,90 | 40.017,70 |
| Laksaportiónir | 184.324 | 169.967 | 195.024 | 171.806 | 213.274 | 303.505 | 423.931 | 428.701,60 | 447.137,50 |
| Laksur, annað | 6.731 | 9.703 | 12.074 | 11.000 | 22.956 | 34.703 | 41.456 | 48.332,40 | 51.599,10 |
| Feks síl | 447 | 484 | 34.657 | 14.043 | 13.814 | 48.320 | 43.865 | 1.356 | 0 |
| Fryst síl | 76.547 | 58.190 | 64.034 | 86.730 | 124.731 | 123.149 | 24.851 | 7.368 | 0 |
| Síl, annað | 372 | 0 | 168 | 0 | 73 | 3.613 | 1.238 | 0 | 0 |
| **Virði tils.** | **762.351** | **498.526** | **473.178** | **593.434** | **963.038** | **1.377.809** | **1.408.009** | **1.626.007** | **1.821.459** |

Talva 2. Útflutningsnøgdin fyri ymsu vørurnar frá 2004 til 2012, í 1000 tonsum

| | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 23.312 | 9.330 | 4.514 | 10.347 | 22.681 | 28.489 | 21.541 | 35.549 | 45.067 |
| Frystur laksur | 3.509 | 2.374 | 1.073 | 2.087 | 1.598 | 2.587 | 1.778 | 747 | 1.483 |
| Laksaportiónir | 3.870 | 3.104 | 2.849 | 2.978 | 4.194 | 5.653 | 6.339 | 5.982 | 7.633 |
| Laksur, annað | 479 | 736 | 1.131 | 1.400 | 3.280 | 3.835 | 4.037 | 3.977 | 4.881 |
| Fesk síl | 21 | 19 | 1.302 | 637 | 644 | 2.059 | 1.273 | 18 | 0 |
| Fryst síl | 3.607 | 2.802 | 2.302 | 3.864 | 5.598 | 4.970 | 779 | 219 | 0 |
| **Tilsamans** | **34.797** | **18.364** | **13.172** | **21.313** | **37.996** | **47.591** | **35.747** | **46.492** | **59.063** |

Talva 3. Miðal útflutningsprísir fyri ymsu vørurnar frá 2004 til 2012, kr.pr.kg.

| | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 18,20 | 22,13 | 29,83 | 24,60 | 24,13 | 27,94 | 37,29 | 31,33 | 28,46 |
| Frystur laksur | 19,84 | 22,61 | 30,36 | 26,49 | 25,55 | 26,52 | 39,09 | 35,49 | 26,99 |
| Laksaportiónir | 47,63 | 54,76 | 68,45 | 57,69 | 50,82 | 53,69 | 66,88 | 71,67 | 58,58 |
| Fesk síl | 21,29 | 25,47 | 26,62 | 22,06 | 21,45 | 23,47 | 34,45 | 74,53 | - |
| Fryst síl | 21,22 | 20,77 | 27,81 | 22,45 | 22,28 | 24,78 | 31,90 | 33,58 | - |

Kelda: Hagstova Føroya

Talvurnar vísa, at bæði nøgdin og útflutningsvirðið av vørum frá alivinnuni eru økt seinastu árini undantikið í 2010.

Prísurin á feskum og frystum laksi hevur verið nakað lægri í 2012 samanborið við 2011, og miðalprísurin á laksaportiónum eisini er lækkaður munandi.

Verður hugt eftir gongdini í miðalprísunum á ymsu vørunum sæst, at miðalprísurin á heilum laksi er fallin munandi síðan 2010, tá hann var óvanliga høgur. Tó kunnu vit væntа, at prísurin í 2013 aftur verður betri, av tí at útboðið ikki økist nakað nevnivert. Prísurin á laksaportiónum hækkaði í árunum 2008-11, men fall aftur í 2012.

Mynd 9. Myndin vísir miðalprísin á ymsum vørum av føroyskum laksi frá 2008-2012 býtt á mánaðir.




Kelda: Hagstova Føroya

Mynd 9 vísir, hvussu útflutningurin av laksi er býttur á ymsar marknaðir í 2012. USA er størsti einstaki marknaðurin og tekur ímóti sløkum 20 prosentum av útflutninginum. ES-marknaðurin tekur ímóti eini slakari helvt av laksinum úr Føroyum, meðan Russland tekur ímóti meira enn 10 prosentum og Kina tekur ímóti umleið 8 prosentum av føroyska útflutninginum av laksi.

Mynd 9. Útflutningur til lyklamarknaðir 2012 (virði)




Kelda: www.salmon.fo

# 3. Mál felagið hevur arbeitt við í árinum

## 3.1 Gjøld fyri tænastur og eftirlit

Á heysti 2012 fekk Havbúnaðarfelagið uppskot til nýggja kunngerð um gjøld fyri umsjón og tænastur, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan veitir (Gjaldskunngerðin). Havbúnaðarfelagið átalaði í hesum sambandi, at kunngerðin gevur Heilsufrøðiligu Starvsstovuni fleiri heimildir at taka gjøld fyri tænastur, tí meðan tímataksturin er tann sami, fær HFS fleiri heimildir at taka gjøld. Havbúnaðarfelagið átalaði samstundis, at HFS nú fær heimild at gera avtalur við fyritøkur um til fulna at rinda tær útreiðslur, ið HFS hevur av avtalum við triðjalond um útflutning av matvørum. Hetta fer helst at merkja øktar útreiðslur fyri vinnuna, tá HFS skal gera og umsita avtalur við t.d. Russland og Kina. Felagið nýtti eisini høvi at gera vart við, at ávís gjøld, sum ætlanin ikki er at broyta, eru ov høgt sett í mun til tær útreiðslur, ið HFS hevur av hesi umsjón.

Havbúnaðarfelagið mótmælir, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan fær víðkaðar heimildir at krevja inn gjøld, uttan at ein meting av øktum útreiðslum fyri vinnuna fylgir við. Tað átti at verið siður hjá almennum myndugleikum at kunna vinnuna væl og virðiliga, tá nýggjar kunngerðir merkja øktar útreiðslur hjá fyritøkum. Hoyringsfreistin var úti um miðjan oktober 2012, men kunngerðin er ikki lýst í mai 2013.

Seinastu árini hevur alivinnan fingið alsamt fleiri gjøld fyri tær tænastur, sum myndugleikarnir veita vinnuni. Hetta er t.d. fyri veterinera eftiransing, yvirvøku av heilivágsleivdum umframt kostnaðin fyri umhvørviseftiransing. Í 2009 og 2010 brúkti Havbúnaðarfelagið nógva orku uppá hetta mál, og nevndin er samd um, at alivinnan kann átaka sær at gjalda fyri tænastur frá tí almenna, men samsvar má vera ímillum veruligu útreiðslurnar av at veita hesar tænastur og tað gjaldið, sum vinnan skal rinda.

Havbúnaðarfelagið hevur ta fatan, at samsvar ikki er millum tær útreiðslur, sum standast av almennu tænastuni og gjøldini, sum alivinnan rindar. Havbúnaðarfelagið hevur áður fingið váttað frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, at gjøldini eru ov høgt ásett í mun til kostnaðin at veita tænasturnar, og Havbúnaðarfelagið hevur áður fingið tilsøgn frá landsstýrismanninum í Vinnumálum um, at gjøldini skulu lækka, men higartil er einki hent tí viðvíkjandi.

Tað er harumframt ógvuliga torført hjá vinnuni at gjøgnumskoða, hvussu nýggja kunngerðin fer at ávirka útreiðslurnar til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, og tí átti ein meting at verið gjørd av hesum. Felagið vil tí taka fyrivarni fyri, at tað ikki hevur verið møguligt at kanna allar avleiðingarnar av kunngerðini út í æsir.

## 3.2 Víðkan av aliøkjum

Havbúnaðarfelagið hevur síðan 2011 arbeitt við málinum um at víðka aliøkini. Á sumri 2011 var felagið á fundi við Vinnumálaráðið um, hvussu hetta kundi skipast. Núverandi samgonga setti í síni vakstrarætlan út í kortið, at aliøkini skuldu víðkast, og Vinnumálaráðið skeyt upp, at verandi aliøki verða víðkað út á landoddarnar av verandi økjum.

Í apríl 2012 fekk Havbúnaðarfelagið uppskot til nýtt fylgiskjal 1 í kunngerð um sjúkufyribyrgjandi rakstur av alibrúkum. Felagið tók sum heild undir við broytingunum í kunngerðini, sum hevur til endamáls at geva alarum rúmari ræsur á alifirðunum, soleiðis at feløgini kunnu leggja framleiðsluna til rættis, so at hon er so burðardygg og effektiv sum gjørligt.

Tann 19. november 2012 kunngjørdi Johan Dahl, landsstýrismaður, broytingarnar í kunngerð um sjúkufyribyrgjandi rakstur av alibrúkum, soleiðis at aliøkini eru víðkað til at fevna um eitt munandi størri øki enn áður.

Í stuttum eru broytingarnar hesar:

- Nakrir av verandi alifirðum eru blivnir til ein alifjørð (tvs. samanlegging av økjum)
- Nakrir alifirðir eru víðkaðir munandi og Skálafjørður strikaður sum alifjørður
- Nýggir alifirðir komnir afturat

Kunngerðin er sostatt broytt, soleiðis at aliøkini eru víðkað út til landoddarnar, og at nýggj øki kunnu takast í nýtslu til aling. Hetta gevur feløgunum betri møguleikar at leggja alingina til rættis á verandi økjum. Nýggju aliøkini kunnu síggjast á www.kortal.fo.

## 3.3 Nýggjur Alipolitikkur

Á heysti 2012 fekk Havbúnaðarfelagið nýggjan Alipolitikk til hoyring, og endamálið er at senda nýggja Alipolitikkin til aðalorðaskifti á Løgtingi. Havbúnaðarfelagið hevur viðgjørt nýggja Alipolitikkin og sent Vinnumálaráðnum hoyringsskriv hesum viðvíkjandi.

Í stuttum kann sigast, at talan er um eina endurskoðan av verandi alipolitikki frá 2005, tá politikkurin varð endurskoðaður eftir kreppu í alivinnuni. Broytingarnar, sum lagt verður upp til, eru í høvuðsheitum í trá við verandi alipolitikk.

Havbúnaðarfelagið tók í høvuðsheitum undir við nýggja uppskotinum, men vísti tó á nøkur viðurskifti, ið kunnu orðast øðrvísi ella broytast. Felagið væntar at fáa eina endurskoðaða útgávu av Alipolitikki landsstýrisins til hoyringar í 2013.

### 3.4 Havumhvørvislógin

Stutt fyri jól í 2012 fekk Havbúnaðarfelagði uppskot til broytingar í havumhvørvislógini til hoyringar (krøv til barlastarvatn). Uppskotið hevur til endamáls at geva landsstýrismanninum heimild til at seta í gildi kunngerðir um útskifting, tøming og viðgerð av barlastarvatni. Við at samtykkja lógaruppskotið tekur Løgtingið samstundis undir við IMO-sáttmálanum um barlastarvatn.[3] Hesin sáttmáli kemur í gildi 12 mánaðir eftir, at minst 30 lond umboðandi samanlagt 35 prosent av bruttotonnaguni, hava tikið undir við sáttmálanum.

Havbúnaðarfelagið tók fult undir við lógaruppskotinum, og tað bleiv samtykt í mai mánað 2013 við onkrum broytingum. Havbúnaðarfelagið metir, at tað hevur stóran týdning at Løgtingið tekur undir við altjóða sáttmálum, sum hava til endamáls at steðga spjaðing av fremmandum verum og smittandi sjúkum, ið kunnu spjaðast millum lond við barlastarvatni. Bæði Noreg og Danmark hava tikið undir við sáttmálanum, og tí er tað upplagt at Føroyar eisini seta hann í gildi.

Havbúnaðarfelagið heldur, at hetta økið hevur ligið á láni í langa tíð, og tí er tað í tøkum tíma, at Føroya Løgting tekur undir við sáttmálanum, og at landsstýrismaðurin fer at seta kunngerðir í gildi viðvíkjandi útskifting av barlastarvatni. Hetta er eitt øki, ið ikki hevur verið regulerað í okkara lógarverki, og havandi í huga tann týdning, ið alivinnan hevur í Føroyum, eiga vit at hava reglur hesum viðvíkjandi.

### 3.5 Serligur skattur á alivinnuna

Við árslok 2010 samtykti Løgtingið eina broyting í skattalógini um at inntøka frá fiski- og alivinnu verður áløgd ein tilfeingis/loyvisskatt uppá 2,5 % av yvirskoti, sum er hægri enn 1 mió. kr. Hesin skattur fellur til landskassan í trimum gjøldum í inntøkuárinum.

Í 2011 og 2012 hava fyritøkurnar í alivinnuni rindað ein serligan tilfeingisskatt. Hesin skattur er eisini galdandi fyri 2013, tí stutt fyri jól samtykti Løgtingið at leingja skipanina við eyka skatti á ali- og fiskivinnuna.

Politisku útmeldingarnar eru, at ali- og fiskivinnan skulu rinda eitt nýtt slag av tilfeingisgjaldi frá 1. januar 2014, men enn er ógreitt, júst hvussu hetta verður skipað. Alivinnan saknar í hesum sambandi greiðar útmeldingar frá landsins leiðslu um, hvussu eitt møguligt gjald verður skipað, soleiðis at alivinnan veit, hvat hon skal rinda í eyka skatti.

Í 2010 og 2011 var Havbúnaðarfelagið við í arbeiðsbólki, sum viðgjørdi spurningin um loyvisskatt. Havbúnaðarfelagið hevur roynt at viðgjørt málið konstruktivt, men hevur eisini sett nakrar treytir fyri, at felagið kann taka undir við eini skipan við tilfeingisskatti. Havbúnaðarfelagið gjørdi frá

[3] International Convention for the Control and Management of Ships´ Ballast Water and Sediments (BWM)

byrjan vart við, at tað ikki tekur undir við einum føstum gjaldi, men mælti ístaðin til, at umrødda gjaldið fyri alivinnuna skuldi vera ein skattlig skipan tengd at úrslitinum, tvs. at møguligum óvanligum yvirskoti, og ikki eitt fast gjald, sum er til stóran ampa í tíðum við vánaligum úrslitum.

Havbúnaðarfelagið hevur í samband við viðgerðina av hesum máli víst á, at yvirskipaðu karmarnir kring alivinnuna mugu betrast. Ítøkiliga hevur Havbúnaðarfelagið víst á, at vinnan hevur tørv á betri trygd fyri aliloyvunum, enn verandi alilóg veitir.

Havbúnaðarfelagið hevur harumframt ta støðu, at felagið er ímóti at gjalda tilfeingisgjald/skatt, samstundis sum fiskivinnan fær stuðul sum t.d. skattafrádrátt til sjófólk og flutningsstuðul. Harumframt rindar alivinnan fyri sítt egna eftirlit frá almennum myndugleikum, meðan fiskivinnan ikki rindar fyri sítt eftirlit. Her krevur Havbúnaðarfelagið, at fiski- og alivinnan fáa somu viðferð.

### 3.6 Broytingar í alilógini

Tann 9. august 2012 legði landsstýrismaðurin í vinnumálum uppskot fyri tingið um broytingar í alilógini. Høvuðsbroytingin í upprunaliga uppskotinum var, at eingin einstakur útlendskur eigari kundi eiga meira enn 30% av felagskapitalinum í einum føroyskum alifelag.

Eftir at uppskotið hevði verið til viðgerðar í Vinnunevnd løgtingsins varð uppskotið hert nakað, soleiðis at markið fyri, hvussu nógv ein einstakur útlendskur eigari kann eiga av felagskapitalinum í einum føroyskum felag, varð broytt til 20 %.

Harumframt vóru krøv til at minst helvtin av nevndarlimunum og nevndarformaðurin vóru heimahoyrandi í Føroyum, men Vinnunevndin broytti hetta, soleiðis at krav bert er til, at meirilutin av nevndarlimunum eru heimahoyrandi í Føroyum.

Løgtingið samtykti broytingaruppskotið hjá Vinnunevndini. Tískil kunnu einstakir útlendskir eigarar ikki eiga meira enn ein fimting av felagskapitalinum í føroyskum alifeløgum. Nýggju ásetingarnar um avmarkingar í útlendskum ognarskapi verða nýttar uppá kapitalpartar, sum eru útvegaðir eftir, at lógin hevur fingið virknað.

Núverandi útlendskir eigarar í føroyskum alifeløgum kunnu sostatt varðveita tann partin av felagskapitalinum, sum teir eiga, áðrenn lógin varð løgd fram, men tað er t.d. ikki møguligt hjá feløgum at ogna sær nýggj aliloyvi, um ein einstakur útlendskur eigari eigur meira enn 20 % av felagskapitalinum.

Havbúnaðarfelagið viðgjørdi málið innanhýsis, men einstøku limirnir vóru hoyringspartar hvør fyri seg, tá ið Vinnunevndin kallaði feløgini inn til hoyring

### 3.7 Aliráðstevnan

Sjeynda árið á rað hevur Havbúnaðarfelagið skipað fyri aliráðstevnu, og hetta er vorðin fastur táttur í virkseminum hjá Havbúnaðarfelagnum. Ætlanin við aliráðstevnuni er at førleikamenna starvsfólkið innan alivinnuna, og hetta er eisini endamálið við teimum fyrilestrum, sum verða hildnir.

Miðað verður eftir at hava eina fjølbroytta skrá, so at tey flestu, ið dagliga starvast innan aling, kunnu fáa okkurt burturúr teimum fyrilestrum, ið verða hildnir. Undirtøkan var sera góð, og umleið 260 fólk høvdu teknað seg til ráðstevnuna, umframt at veitslan um kvøldið var fullteknað.

### 3.8 Lúsastøðan og rakstrarkunngerðin

Lívfrøðilig viðurskifti eru stórsta hóttanin hjá alivinnuni. Lús er eitt evni, sum áhaldandi er neyðugt at viðgera, og hevur hetta verið eitt afturvendandi evni á nevndarfundum hjá Havbúnaðarfelagnum seinasta árið.

Feløgini samdust á vári 2012 um at gevast við at nýta avlúsingarevni, ið kunnu elva til mótstøðuføri. Ístaðin fóru feløgini at avlúsa við hydrogenperoxidi, ið er eitt evni, sum kostar munandi meira, og tí økir rakstrarkostnaðin hjá feløgunum. Endamálið er, at hini evnini, ið hava verið nýtt, kunnu fáa sín virkning aftur, so at feløgini í framtíðini kunnu nýta hesi evni, ið eisini eru bíligari.

Á vári 2013 hava feløgini í Havbúnaðarfelagnum gjørt eina skrivliga sjálvbodna avtalu um felags avlúsing og at býta upplýsingar sínamillum um úrslitini frá avlúsingum og lúsateljingum, og avvarðandi myndugleikar eru kunnaðir um hetta.

Semja er framvegis um, at tørvur er á felags átøkum, har øll alibrúkini samskipa átøkini ímóti lús, soleiðis at bilbukt kann fáast við lúsatrupulleikanum, og alifeløgini eru tí farin at samstarva meira um hetta seinastu árini.

Endurskoðan av rakstrarkunngerðini hevur eisini verið eitt afturvendandi evni hjá Havbúnaðarfelagnum, og Landsdjóralæknin boðaði frá, at arbeiðið við at endurskoða rakstrarkunngerðina skuldi byrja á heysti 2011, men enn er ikki komið á mál viðvíkjandi hesi endurskoðan.

### 3.9 Granskingarverkætlanir

Havbúnaðarfelagið luttekur í løtuni í tveimum granskingarverkætlanum, sum felagið er við til at fíggja. Onnur er verkætlanin hjá Fiskaaling við reinsifiskum, sum skulu nýtast til tálming av lús. Verkætlanin hevur eitt ár á baki, og væntandi kunnu rognkelsi setast út í aliringar seint í 2013. Hin verkætlanin er aling á opnum havi, sum Fiskaaling eisini stendur fyri við stuðli frá

Havbúnaðarfelagnum, Tryggingarfelagnum Føroyar, Vónini og KJ Hydraulik. Ætlanin er at leggja ringar út eystanfyri Nólsoynna á sumri 2013.

### 3.10 Salmon from the Faroe Islands

Verkætlanin við felags marknaðarføring av føroyskum laksi fór av bakkastokki við ársbyrjan 2010. Orsøkin var, at kappingarneytarnir í Skotlandi og Noregi nýta hundraðtals milliónir á hvørjum ári at marknaðarføra sín laks undir einum felags merki. Endamálið við verkætlanini er at geva føroyskum alifiski ein felags samleika og at framleiða felags tilfar til marknaðarføring.
Salmon from the Faroe Islands varð umboðað á sølustevnum í Boston og Bruxelles í 2012, eins og heimasíðan, www.salmon.fo verður dagførd við tilfari um føroyskan alifisk. Nevndin í Havbúnaðarfelagnum tók síðst í 2012 avgerð um, at umsitingin hjá Havbúnaðarfelagnum skal reka verkætlanina víðari í 2013.

### 3.11 ISFA og FEAP

Havbúnaðarfelagið er limur í altjóða felagsskapunum ISFA (International Salmon Farmers Association) og FEAP (The Federation of European Aquaculture Producers. Havbúnaðarfelagið luttók á aðalfundinum hjá FEAP í Inverness í mai 2012.

# 4. lógir og kunngerðir

Í 2012 vórðu nakrar lógir og kunngerðir, sum hava týdning fyri alivinnuna, settar í verk.

## 4.1 Lóg um tilfeingis/loyvisskatt

Løgtingsmál nr. 63/2012: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (skattalógin) (tilfeingis/loyvisskattur). Tingið samtykti tann 19. desember 2012 at leingja skipanina við tilfeingisskatti, sum hevur verið galdandi í 2011 og 2012. Sostatt skulu fiski- og alivinnan eisini í 2013 rinda 2,5 % í eyka skatti á yvirskot omanfyri 1 mió. kr.
Í almennu viðmerkingunum stendur: "Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum mælir við hesum til at gera broytingar í skattalógini. Skotið verður upp, at serligi tilfeingis- og loyvisskatturin, ið hevur verið galdandi fyri 2011 og 2012, eisini verður galdandi fyri 2013. Í samgonguskjalinum er ásett, at tilfeingis- og loyvisskattur, líkur tí, sum er galdandi fyri 2011, verður lagdur á eyka stóran vinning hjá alivinnu og fiskiskipum. Hesin skattur fer í landskassan."

## 4.2 Rakstrarkunngerðin

Kunngerð nr. 134 frá 16. oktober 2009 um sjúkufyribyrgjandi rakstur av alibrúkum sum seinast broytt við kunngerð nr. 111 frá 19. november 2012.

Broytingin er í stuttum, at Fylgiskjal 1 í rakstrarkunngerðini er broytt, soleiðis at aliøkini eru víðkað út á ytstu landoddar. Havbúnaðarfelagið hevur havt málið til viðgerðar og hevur latið Heilsufrøðiligu Starvsstovuni hoyringsskriv í hesum máli.

## 4.3 Broytingar í alilógini

Løgtingsmál nr. 7/2012: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um aling av fiski v.m. Løgtingið samtykti 14. desember broytingar í alilógini, sum í høvuðsheitum merkja, at eingin einstakur útlendskur eigari kann eiga meira enn 20% av felagskapitalinum í einum alifelag ella móðurfelag tess.

Harumframt vórðu broytingar um, at meirilutin í nevndini í føroyskum alifeløgum skulu vera heimahoyrandi í Føroyum, samtyktar.

## 4.4 Hoyring um broyting í gjøldum

Havbúnaðarfelagið fekk 27. september uppskot til kunngerð um gjøld fyri tænastur, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan veitir (Gjaldskunngerðin) til hoyringar frá Vinnumálaráðnum.

Havbúnaðarfelagið hevur viðgjørt uppskotið og latið Vinnumálaráðnum hoyringsskriv á heysti 2012. Nýggj kunngerð er tó ikki lýst enn.

### 4.5 Hoyring um yvirvøku av ymsum sjúkum

Uppskot til kunngerð um yvirvøku, avmarking, tálming og niðurberjing av smittandi sjúkum í alibrúkum varð send felagnum til hoyringar í mars 2012. Havbúnaðarfelagið hevur viðgjørt uppskotið við serfrøðingum í feløgunum og hevur sent Landsdjóralæknanum á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni hoyringssvar.

Havbúnaðarfelagið hevur fyrst í 2013 eisini verið á fundi við Landsdjóralæknan fyri at umrøða nýggju kunngerðina. Á hesum fundi varð avrátt at seta í verk sjálvbodna yvirvøku av nøkrum fiskasjúkum sum t.d. PD fyri at fáa eina góða heildarmynd av støðuni, meðan Landsdjóralæknin arbeiðir víðari við kunngerðini um fiskasjúkur.

Nýggja kunngerðin um yvirvøku av smittandi sjúkum í alibrúkum er ikki sett í verk enn.